


*Á stabbamyndini sæst hvør mannar ráðini í Noregi, Danmark, Svøríki og Íslandi*

# r á helminginum rissessunum

landsstýrismenninar í menta-, vinnu- og innlendismálum.

Hyggja vit nærri at útbúgvingarstignum hjá landsstýrismonnunum er myndin rættiliga eintýðug. Sambært heimasíðuni www.tinganes.fo hava yvir helmingurin av limunum í landsstýrinum útbúgving sum fólkaskúlalærarar. Talan er um Jóannes Eidesgaard, Bjarna Djurholm, Bjørn Kalsø og Jógvan á Lakjuni.

Írestandi limirnir í landsstýrinum eru Bárður Nielsen, Jógvan við Keldu og Hans Pauli Strøm, og hesir hava nomið sær útbúgving innan ávikavist granskoðan, handil- og skrivstovu og sosiologi.

### Akademikarar í hópatal

Meðan helmingurin av sitandi landsstýrið hava nomið sær útbúgving sum fólkaskúlalærarar er myndin grundleggjandi øðrvísi í okkara grannalondum. Á myndini omanfyri sæst, at tað eru serliga akademikarar, ið seta seg á ráðharrasessirnar í okkara grannalondum.

Millum 70 til 80 % av sitandi ráðharrum í Noregi, Íslandi, Danmark og Svøríki hava eitthvørt akademiskt prógv, meðan eitt nú lærarar eru við minnilutan. Svøriki er tað Norðanlandi, ið akademikararnir eru ídnastir at seta seg á ráðharrasessirnar.

Heili 81 % av ráðharranum hava antin eina styttr ella longri akademiska útbúgving( kandidat ella BA-prógv blðm). Talan er í flestu førum um stjórnmálafrøðingar, búskaparfrøðingar ella løgfrøðingar.

### Hvønn týdning?

Men er so nakar munur á avrikinum eitt nú okkara innlendismálaráðharra, sum hevur skrivstovuútbúgving norðan úr Klaksvík og danska fíggjarmálaráðharranum og búskaparfrøðinginum Thor Petersen?

Er ein akademikari per definition ein betur egnaður ráðharri ella landsstýrismaður ella eru hevur útbúgvingin lítlan og ongan týdning?

Hetta eru millum spurningar, vit hava vit sett samfelagsfrøðinginum Súna á Dalbø og fyrrverandi ráðharrunum Hans Engell og Finnboga Ísakson.

# Útbúgvingin als eingin trygd

**Samfelagsfrøðingurin Súni á Dalbø heldur ikki tað er avgerandi, um ein landsstýrismaðurin hevur høga útbúgving. - Nógv meira avgerandi er tað, um landsstýrismaðurin ella ráðharrin hevur skil og virðing fyri fólkaræðinum og fyrisitingarligari góðsku, metir hann**

ÚTBÚGVINGARSTIGIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Jóngerð Purkús er jú búskaparfrøðingur. Hon segði alment sum fíggjarmálaráðharri, at alt var í fínasta lagi búskaparliga í Føroyum í 1988, beint áðrenn Føroyar fóru á húsagang. So útbúgvingarstigið - í sjálvum sær- er eingin garantur fyri nøkrum sum helst í hesum sambandi.

Súni á Dalbø er útbúgvin stjórnmálafrøðingur, og hann starvast í dag á lærda háskúlanum í Aalborg. Hann heldur, at vit skulu vera ógvuliga varin við at yvirmeta týdningin av útbúgvingarstignum, tá heildaravrikið hjá landsstýrismonnum skulu eftirmetast.

– Tað er langt frá nøktandi, at landsstýrismaðurin er fakliga væl fyri. Nógv meira avgerandi, er tað, um landsstýrismaðurin ella ráðharrin hevur skil og virðing fyri fólkaræðinum og fyrisitingarligari góðsku, metir Súni á Dalbø.

### Hægri krøv

Føroyska miðfyrisitingin telir í dag sjey aðalráð. Flestu aðalráðini eru væl mannað við fólki, ið hava drúgvar útbúgvingar á alskyns lærdum háskúlum. Fremsta arbeiðið hjá embætisfólkunum er at ráðgeva landsstýrisfólkunum í málum, sum tey hava innlit í. Talan kann bæði vera um politiska, løgfrøðiliga og búskaparliga ráðgeving.

Við einum fakligum sterkum embætisverki, er tað ikki líka mikið um landstýrisfólkið hevur 7.flokk ella kann kalla seg akademikara?

– Tað er als ikki spurningur um fakliga styrki hjá embætisverkinum, sum er avgerandi fyri, um tað er nøktandi, at ráðharrin ella landsstýrismaðurin hevur 7. flokk. Hinvegin kanst tú møguliga siga, at um embætisverkið er sterkt, so setur tað størri krøv til landsstýrismannin um, at fólkaræðislig prinsipp skulu vera galdandi í eini fyrisiting. Um tú hugsar um tað fólkaræðisliga, so setur eitt sterkt embætisverk størri krøv til førleikan hjá ráðharranum, og ikki øvugt, svarar stjórnmálafrøðingurin.

Súni Dalbø arbeiddi eitt tíðarskeið í føroysku miðfyrisitingini. Hann hevur arbeitt á Mentamálaráðnum og havt tilknýti til Oljumálaráðið.



*– Tað er als ikki spurningur um fakliga styrki hjá embætisverkinum, sum er avgerandi fyri, um tað er nøktandi, at ráðharrin ella landsstýrismaðurin hevur 7.flokk. Hinvegin kanst tú møguliga siga, at um embætisverkið er sterkt, so setur tað størri krøv til landsstýrismannin um, at fólkaræðislig prinsipp skulu vera galdandi í eini fyrisiting, sigur Súni á Dalbø*

### Ongantíð ein vansi

Forsætisráðharrin í Danmark, Anders Fogh Rasmussen og fyrrverandi formaðurin hjá Danska Javnaðarflokkinum, Mogens Lykketoft, eru ávikavist ein núverandi og ein fyrrverandi ráðharri, sum báðir hava lokið akademiskt prógv. Fogh Rasmussen og Lykketoft bera báðir orð fyri at vera ómetaliga væl fyri fakliga, og hetta elvdi ofta til stríð í teimum ráðum, teir umsótu.

Hvørki Anders Fogh Rasmussen ella Mogens Lykketoft fírdu fyri at seta krøv til embætisfólki og løgdu seg ofta út í arbeiðið hjá embætisfólkunum, um teir ikki meta arbeiðið vera nøktandi. Teirra uppíblanding í dagliga arbeiðið skapti ofta ónøgd millum embætisfólki í teirra ráðum.

Kann tað hinvegin vera ein vansi, at ein ráðharri ella landsstýrismaður er ov væl fyri fakliga fyri arbeiðsstevi og harvið avrikini í einum ráði?

– Tað hvørki kann ella skal kunna vera ein vansi, at ein ráðharri er væl fyri fakliga. Er ónøgd við ein landsstýrismann ella ein ráðharra, so eru vanliga onnur øki, sum vanta. Tað kann vera vantandi innlit og virðing fyri fólkaræðisligari fyrisiting, vantandi leiðsluevni, vantandi samband millum visiónir og gerandisdagin, sum er vansin og ikki fakligi førleikin, heldur Súni á Dalbø.

### Nógv serfrøði

Føroyar verða stýrdar av heksadoktarum. Hetta var yvirskriftin á eini grein, sum stjórnmálafrøðingurin, Sjurður Skaale, skrivaði herfyri.

Sjúrður fíltist á, at serfrøðin og serliga advokatar hava fingið alt ov stórt vald á politiska leikpallinum í Føroyum. Stjórnmálafrøðingurin vísti á, at føroyskir politikarar leitaðu sær serfrøðingavitan uttanfyri teirra egna embætisverk, tá stórar politiskar avgerðir skulu takast.

Eitt dømið um slíkan framferðarhátt var málið um fyrrverandi landsstýrismannin, Jørgen Niclasen, tá ein kanningarstjóri varð nýttur av tásitandi løgmanni, Anfinni Kallsberg,

*Kann orsøkin til, at landsstýrismenn eru so skjótir at leita sær serfrøðingavitan vera, at teir sjálvir ikki eru nóg væl fyri fakliga?*

– Talan kan bæði vera um ein óhepnan, men ótilvitaðan præcedens, sum síðan er blivin ein partur av hvussu »man« arbeiðir sum landsstýrismaður. Eisini kann talan verða um, at ráðharran vil dekka sína egnu reyv við at fáa upprit av øllum handaslagi frá serfrøðingum. Grundleggjandi eigur ein ráðharri at byggja sítt virksemi á viljan hjá teimum fólkavaldu, metir Súni á Dalbø.

# gerast ein forðing

góð útbúgving, serliga um samfelagsviðurskifti, kann vera gott ískoyti í teir eginleikar, eg havi nevnt frammanfyri. Hevur ein landsstýrismaður útbúgving á málsøkjum, hann umsitir, kann tað skjóttføra til, at hann hongur seg ov nógv í fakligar smálutir og ikki dugir nóg væl at síggja heildina.

*3) Við einum fakliga sterkum embætisverki, er tað ikki líka mikið, um ein landsstýrismaður hevur 7.flokk úr Fólkaskúlanum ella eina langa akademiska útbúgving?*

Finnbogi: Tað er avgjørt neyðugt við einum fakliga sterkum embætisverki, og hjá okkum má tað nú vera betur útgjørt enn nakrantíð. Í prinsippinum hevur tað ongan týdning, um landsstýrismaðurin dugir at lesa ella er analfabetur, men sum nevnt undir fyrsta punkti haldi eg tað vera neyðugt, at ein landsstýrismaður hevur ávísar eginleikar.

*4) Í Tinghelluni 14 mai nevnir tú, at føroysk embætisfólk eru nakað skjót at stinga nøsina fram.Hvat meinar tú við hesari útsøgn?*

Finnbogi: Eftir húsagangin fyrst í nítiárunum fingu politikarnir alla skylduna. Millum manna var virðingin - eisini millum embætisfólk - minni enn frammanundan. Embætisfólk hava sum onnur í samfelagnum sínar meiningar, og nú var kjansurin at royna at troka sínar egnu meiningar ígjøgnum, tí politikararnir nyttaðu sum kunnugt einki. Tað var hetta, eg hugsaði um í greinini, tú sipar til.

*5) Eru tað tínar royndir, at føroysk embætisfólk eru politisk?*

Finnbogi: Mínar royndir eru, at embætisfólk sum heild eru ikki politisk í sínum arbeiði. Einstøk undantøk havi eg kortini upplivað, og tá hava embætisfólkini fyrst og fremst verið partapolitisk.